# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Fyri 30 árum síðan:

## Fimm sjólætnir í 1979

Mynd frá minningarhaldi teirra sjólætnu í Havna alla halgannadag í 1979.

Minningarhaldið var á Sjómansheiminum, og aftaná varð farið niðan í Viðarlundina, har kransar vórðu lagdir við minnisvarða teirra sjólætnu.

Fimm vóru sjólætnir hetta árið: Torfinn Hovgaard, Vágur, Eilif Mørkøre, Eiði, Eyðun Djurhuus, Tórshavn, Arthur Peter Frost, Tórshavn, og Joen Johannesen, Leirvík.

Umframt tey avvarðandi vóru eisini umboð fyri almennar stovnar við til minningarhaldið so sum Sjóvátrygging og Skipasýnið, Atli Dam og Leif Groth løgdu kransar fyri ávikavist landsstýrið og donsku stjórnina, Petur Christiansen fyri Tórshavnar býráð og Óli Jacobsen legði krans fyri Fiskimannafelagið. Næmingar á Føroya Sjómansskúla og Føroya Fólkaháskúla luttóku eisini í minningarhaldinum.



*Petur Christiansen, býráðsformaður, og Leif Groth, ríkisumboðsmaður*
*Kelda: Kolon 1979*

## Andlát og jarðarferðir

**Hilbert Martin Blástein, ættaður av Válinum í Vestmanna**, búsitandi á Viðareiði, andaðist umborð á Polarhav hósdagin 12. novmeber, 29 ára gamal.

**Wivica Birch Larsen** andaðist á Ålborg Hospitali mikudagin 11. november, 47 ára gomul.

# MERKISDAGAR

**Silvurbrúdleyp**
Sunnudagin 18. okt. høvdu Birgit og Hanus Hansen, klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 12. des. kl. 19 í Badmintonhøllini í klaksvík. Tey sum ynskja at gleðast saman við silvurbrúðarparinum, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 227479 ella 455592. Ella við at skriva til: bsh@post.olivant.fo áðrenn 3.desember.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 24. nov. hava hjúnini Oluffa og Niels Andreasen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verur hildin í K.F.U.M & K Klaksvík, fra kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des halda við bæði, Pálin og Henry Olsen, Rituvík okkara silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við veitslu í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tit, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 219134 (Henry) ella 223534 (Pálin). Til ber eisini at senda ein teldupost: henry-o@olivant.fo ella palin.olsen@skulin.fo áðrenn 15. desember.

**Gullbrúdleyp**
Hósdagin 19. nov. hava hjúnini Ása og Jógvan Rasmussen, í Miðvági, gullbrúðleyp. Dagurin verur hildin heima, frá kl. 16. Øll eru vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
28. nov. hava hjúnini Tóra og Ólavur Nolsøe Olsen, Fuglafjørður, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík leygardagin 5. des. kl. 18. Tey ið vilja halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 444159 - 737751 ella toraolavur@gmail.com áðrenn 20. nov.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 5. des. hava hjúnini Jóna og Kjartan Z. Jacobsen, Klaksvík, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Skálanum frá kl. 18. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á heimatlf. okkara 455646, tlf. 224750 og tlf. 225698, til og við leygardagin 21. nov.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 5. des. kunnu hjúnini Edith og Páll Klettskarð, í Haraldssundi, halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Haraldssundi í millum kl. 12 og 17. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, eru hjartaliga vælkomin.

## Rokaður bryggjaríbilur




Bedford lastbilur hjá Restorffs Bryggjarí í 1979. Myndin er á eini lýsing hjá Restorffs, har teir lýsa við, at soleiðis fer bilurin hvønn morgun við ørgrynnu av leskidrykkum og øli at sløkkja tostan við.

Sløgini sum Restorffs Bryggjarí lýsir við eru: Pepsi Cola, Hawaii Dream, Sitrónvatn, Appelsin Squash, Perudrykkur, Appolinaris, Sisu, Lemonada, Murcia, Sportvatn, Tonic Water, Garpe Tonic Víkingur og Maltøl.

Myndin er tikin í niðankoyringini til bryggjaríið frá Landavegnum.

**Dagurin**
16. november. Otenius. Skrivað skeivt fyri hin halga Otmarus, sum var abbati í kleystrinum St. Gallen í Sveis og doyði í 759.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

Lesið Sosialin -so eru tit við!